Framburður og avbjóðingar

Setanarrøða hjá Johan Dahl, landsstýrismanni í vinnumálum, á aliráðstevnuni 2012.

Vit hava nú í nøkur ár á rað kunna fegnast um, at vit í Føroyum hava eina alivinnu, sum verður roknað fyri at verða millum fremstu í heiminum.

Orsøkirnar til, at so er, eru mangar. Vit hava sera dugnalig og framskygd fólk í vinnuni, vit hava gott natúrligt umhvørvi til aling, vit hava góðar karmar fyri vinnuna og fólk, sum umsita hesar karmar.

Ofta er tað so, at man í góðum tíðum av ósketni leggur grundarlag fyri verri tíðir. Hendan áminningin er ikki nógv meira enn at minna hvønn annan at vera á varðhaldi, so vit ikki koma í støður, sum vit fyrr hava verið í. Eg skilji tó, at ein aktuellur trupulleiki, sum man stríðist við, er lúsaplágan.

Eg veit, at alararnir taka hetta málið í álvara og eftirlitið við. Eg skilji, at ymiskir mátar verða royndir at halda lúsini niðri – bæði við avlúsingarhættum og mátum at ala uppá.

Umframt alla tíðina at ansa eftir at verandi virksemi fer fram á ein burðardyggan hátt, so er eisini ein uppgáva at gera útvegir fyri, at vinnan kann mennast og vaksa. Arbeitt verður áhaldandi við at ætlanini at víðka aliøkini og fara út á hav at ala. Eisini eri eg vitandi um, at ætlanir eru um at fara upp á land ala. Harumframt eru hugsanir at ala annað enn laks.

Eg eri eisini sera fegin um, at nógv verður gjørt burtur úr at granska viðvíkjandi ymisku viðurskiftum innan alingina. Her hugsi eg fyrst og fremst um granskingina á Fiskaaling, men eisini fegnist eg um tilgongdina at fáa skipað eitt granskarasetur, har tað hevur eydnast at fáa vinnuna uppí.

Av skránni fyri aliráðstevnuna framgongur, at vinnan framhaldandi gevur sær nógv far um, hvussu alast kann á ein burðardyggan hátt, umframt hvussu vinnan kann mennast, og hvussu støðan er. Hetta ber boð um eina ábyrgdarfulla vinnu við visiónum.

Týdningarmikið er samstarvið millum alivinnuna og tað almenna, og hevur tað verið gott og opið. Eg vóni, at hetta framhaldandi kann vera so, tí hetta er ein av

fortreytunum fyri góðum og stabilum karmum, eg vil í hvussu er leggja meg eftir, at so skal vera.

Eg vil at enda ynskja alarunum og teimum, sum hava við alivinnuna at gera, góða eydnu við virksemi tykkara og eisini við hesum tiltakinum í dag.